## Noreg ger kvetti

Tann góði oljuprísurin ger, at pengarnir renna niður í norska ríkiskassan í hesum døgum.

Fyrradagin var prísurin á marknaðinum í New York líka høgur sum undir oljukreppuni tíðliga í sjeytiárunum, men kortini væl niðan fyri prísin í 1979, tá kollveltingin í Iran sendi prísin upp ígjøgnum.

Norskir fjølmiðlar siga, at sambært útrokningum fær norski ríkiskassin einar 50 milliardir krónur meiri burtur úr oljuni í ár, enn roknað varð við á nýggjárinum. Á verandi fíggjarlóg er roknað við, at ríkiskassin fær 160 milliardir krónur burtur úr oljuni, men nú verður sagt, at hetta talið verður nakað oman fyri 200 milliardir krónur, tá árið er av.

Tað er ikki bara kríggið í Irak, sum er orsøkin til tann høga oljuprísin. Í Nigeria hóttir ein uppreistrarfelagsskapur við at søkja at oljuútbúnaðinum og útlendingum, sum arbeiða í oljuvinnuni, og harafturat er tað stóra russiska oljufelagiðm Yukos í stórum trupulleikum orsakað av einum ovurstórum skattakravi.

Saudiarabiska stjórnin kunngjørdi mánadagin, at hon er sinnað at økja framleiðsluna, men á marknaðinum verður ikki hildið, at tað fer at fáa stórvegis ávirkan á prísin.

## Aftur í andgletti

Nýggi danski ES-kommiserurin, arianna Fischer Boel, segði ikki alt, tá hon herfyri kunnaði ES-leiðsluna um síni fíggjarligu áhugamál.

Í einari frágreiðing skrivaði hon, at hon hevði eingi áhugamál, sum stríða ímóti reglunum, sum eru galdandi fyri kommiserarnar hjá ES. Hesar reglurnar krevja millum annað, at eigur ein kommiserur meiri enn 50.000 krónur í partapeningi í einari fyritøku, skal hann boða frá tí. Men kortini nevndi Mariann Fischer Boel einki um, at hon eigur 100.000 krónur í partapeningi í sukurvirkinum Danisco og 90.000 krónur í Danske Bank.

Sambært Politiken hevur kommiserurin ongar viðmrkingar til tað, sum nú er komið fram, men Kaj Ikast, sum er fólkatingsmaður hjá Konservativa Fólkaflokkinum, sigur seg ikki minnast nakað annað dømi um, at ein tinglimur hevur gloymt slíkar upplýsingar. Í andstøðuflokkinum SF verður málið mett álvarssamt, skrivar Politiken.

## Verður ikki stongdur

Herfyri samtykti býráðið í Berlin at steingja ta kendu Tempelhof-floghavnina, tí hon bar seg ikki fíggjarliga Men níggju borgarar í býnum vildu ikki góðtaka avgerðina. Tey løgdu málið fyri dómsvaldið, og nú hevur hægstirættur ógildað avgerðina hjá býráðnum.

Tempelhof-floghavnin bleiv tikin í nýtslu í sambandi við teir olympisku leikirnar í Berlin í 1936, men tað var í 1948, at hon gjørdist kend um allan heimin. Tann 24. juni tað árið kunngjørdi Sovjetsamveldið, at tað hevði gjørt av at steðga allari samferðslu ímillum Vesturtýskland og Berlin. Fýra dagar seinni avgjørdu teir sameindu at brúka Tempelhof-floghavnina sum bindilið, og í næstan eitt ár var hon lívsæðrin hjá tí avbyrgda Berlin. Tann 12. mai í 1949 góvust russar við avbyrgingini.

Hóast tann søguliga floghavnin ikki verður stongd kortini, eru framtíðarútlitini ikki tey bestu. Myndugleikarnir hava gjørt av at gera eina nýgja altjóða floghavn, sum skal loysa Schønefeld-floghavnina av, og so verður ikki tørvur á Tempelhof. Kortini vóna tey, sum vilja varðveita ta søguligu floghavnina, at hon kann haldast opin til 2010, tá tann nýggja verður liðug.

# Italia rindaði loysigjald fyri Simonurnar

**Í tríggjar vikur vóru Simona Pari og Simona Toretta gíslar hjá einum irakskum yvirgangsbólki**

GÍSLAR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað vóru tvær fegnar kvinnur, sum vóru í flogfarinum, sum setti seg í altjóða floghavnini í Rom á midnátt fyrakvøldið.

Síðani tann 7. september høvdu tær 29 ára gomlu Simona Pari og Simona Toretta verið gíslar hjá einum bólki í Irak. Fyri einari viku síðani visti ein arabisk sjónvarpsstøð at siga, at burturflytararnir høvdu avrættað tær báðar, men italsku myndugleikarnir vístu tíðindunum aftur. Teir hildu uppá, at kvinnurnar vóru á lívi. Tað vísti seg eisini at vera so.

Orsøkin til, at teir italsku myndugleikarnir vistu tað, var ivaleyst, at loyniligar samráðingar vóru við burturflytararnar, hóast italska stjórnin alment helt uppá, at hon fór ikki at samráðast við burturflytararnar. Nú kvinnurnar eru slopnar heimaftur, hevur eitt blað í Kuwait avdúkað, at burturflytararnir fingu eina millión dollarar aftur fyri at lata kvinnurnar leysar. Silvio Berlusconi, forsætisráðharri, hevur sýtt fyri at gera viðmerkingar til tíðindini í blaðnum, men tíðindastovan Reuters sigur frá einum embætismanni hjá italsku stjórnini, at tíðindini eru sonn. Hann sigur tó, at upphæddin var nakað minni enn ein millión dollarar.

# Viðgekk mistøk í Irak

**Tony Blair bað um umbering fyri at hava givið bretska fólkinum skeivar upplýsingar um hópoyðingarvápnini hjá Irak**

BRETLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Upplýsingarnar um hópoyðingarvápnini vístu seg at vera skeivar. Tað má eg viðganga í dag, men tá var allur heimurin á einum máli um, at Irak hevði slík vápn.

Orðini komu frá bretska forsætisráðharranum, Tony Blair, tá hann helt røðu á landsfundinum hjá arbeiðaraflokkinum fyrradagin. Hann legði tó afturat, at hann ætlaði sær ikki at biðja um umbering fyri at hava verið við til at koyra Saddam Hussein frá.

– Eg eri sannførdur um, at tað er tað betri fyri heimin, at Saddam situr í fongsli, enn at hann situr við valdið, segði Blair.

Hann segði seg skilja, at Irak-kríggið hevur elvt til split í Bretlandi og í hansara egna flokki, men hann segði, at hann hevði tikið sína agerð í sannføringini um, at tað var tað besta fyri Bretland.



*Blair bað um umbering*

# Russland skal trýstast til at góðkenna Kyoto

**ES ætlar sær at leggja trýst á russisku myndugleikarnar fyri at fáa teir at staðfesta Kyoto-sáttmálan**

UMHVØRVI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er nú ikki júst fyri at verja umhvørvið, at ES vil hava Russland at staðfesta Kyoto-sáttmálan. ES-londini dálka so mikið illa, at tey klára ikki at lúka treytirnar í sáttmálanum, og tí hava tey fyri neyðini at keypa sær dálkingarkvotur frá londum, sum eiga kvotur til avlops. Eitt av hesum londunum er Russland.

Men ES vil ikki keypa kvotur úr Russlandi, fyrr enn Moskva hevur staðfest Kyoto-sáttmálan, og tí ætlar orkukommiserurin, Loyola de Palacio, at ES skal leggja størri trýst á stjórnina í Moskva.

Ein orsøk til at ES hevur tørv á dálkingarkvotum frá russum er, at tey seinastu 15 árini er lítið gjørt fyri at menna orkukeldur, sum dálka minni. Aftan á oljukreppuna í sjeytiárunum løgdu fleiri lond í Evropa stóran dent á at menna orkukeldur, sum fara væl við umhvørvinum, men hetta arbeiðið steðgaði upp fyrst í nítiárunum. Tí táttar í nú, skrivar Aftenposten.



# Føroyskt oljufelag í oddinum

OLJULEITING
*Jan Müller*

Føroyska oljufelagið Faroe Petroleum liggur á einum fimta plássi, tá talan er um samlað loyvisøkisareal á øllum Atlantsmótinum. Í eini uppgerð, sum Teitur Poulsen, analytikari hjá felagnum hevur gjørt fyri Sosialin, vísir tað seg, at føroyska felagið hevur fingið tillutað størri øki á Atlantsmótinum enn fleiri av teimum stóru oljufeløgunum sum eitt nú Amerada Hess, Total, BG og BP.

Í uppgerðini sæst, at ChevronTexaco liggur klárt á odda við góðum 7000 km2. Síðani kemur Shell við 6670 km2, triðj er Statoil við 5366 km2, fjórð er Dong við 5013 km2 og á einum fimtaplássi liggur Faroe Petroleum við 4155 km2. Hitt føroyska oljufelagið hevur fingið tillutað eitt øki uppá 702 km2.

**Estimated Exploration Acreage (Km2) in North Atlantic margin - by Company**

| | WoS (excl 22nd Round) | WoS 22nd Round | Total WoS | Faroes | Total Faroes + WoS |
|---|---|---|---|---|---|
| CvX | 2253 | 4816 | 7069 | 0 | 7069 |
| Shell | 3132 | 1486 | 4618 | 2052 | 6670 |
| Statoil | 2698 | 900 | 3598 | 1768 | 5366 |
| Dong | 999 | 2000 | 2999 | 2014 | 5013 |
| Fareo Pet | 0 | 3456 | 3456 | 699 | 4155 |
| ENI | 1903 | 1200 | 3103 | 699 | 3802 |
| OMV | 1940 | 1690 | 3630 | 0 | 3630 |
| BP | 1387 | 1486 | 2873 | 284 | 3157 |
| Anadarko | 117 | 0 | 117 | 2495 | 2612 |
| CoP | 2459 | 0 | 2459 | 0 | 2459 |
| Hess | 1974 | 200 | 2174 | 246 | 2420 |
| XoM | 2099 | 0 | 2099 | 0 | 2099 |
| PCanada | 205 | 0 | 205 | 1768 | 1973 |
| Total | 146 | 1200 | 1346 | 0 | 1346 |
| Atlantic | 256 | 200 | 456 | 246 | 702 |
| BG | 250 | 200 | 450 | 246 | 696 |
| Intrepid | 300 | 0 | 300 | 0 | 300 |




Sosialurin í Sosialurin




FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN

**KUNNING FRÁ FÚTASKRIVSTOVUNI UM PASS**

Tann 1. oktober 2004 verður nýggja útgávan av føroyska/danska passinum tikin í nýtslu.

Nýggja passið er eitt hátøkniligt trygdarpass.

**Onki krav verður sett um umbýtan av galdandi passi!**

Av tí at nýggja passframleiðsluútgerðin er so kostnaðarmikil, er avgerð tikin um at gevast við passframleiðsluni í Føroyum, soleiðis at øll passframleiðsla verður miðsavnað í Danmark.

**Hetta ger, at møguleikin hjá fútaskrivstovuni í skundi at útskriva nýtt pass eftir 1. oktober 2004 dettur burtur.** Í staðin ber til í summum førum at framleingja verandi pass ella at fáa útflýggja "provisorisk" (fyribils) pass.

**Hetta førir eisini við sær, at passavgreiðslutíðin tá verður umleið 2 - 3 vikur.** Tí er alneyðugt, at fólk, ið hava tørv á nýggjum passi eftir 1. oktober 2004, umbiðja passið í góðari tíð.

Frá 1. oktober 2004 kunnu børn undir 15 ár ikki verða skrivað í pass hjá foreldrum ella øðrum og skulu tá hava egið pass.

Mannagongdin at umbiðja pass verður hin sama sum nú. Passavgreiðslur eru á fútaskrivstovuni í Havn og á politistøðunum uttanfyri Havnina.

Upplýsingar um pass annars eru tøkar á heimasíðuni hjá politinum: www.politi.fo

M. Nepper-Christensen

Smyrilsvegur 20 Postboks 3018 FO-110 Tórshavn Tel (+298)351448 Telefax (+298) 351452



Seinasta freist at lata broytingar inn til telefonbókina 2005 er mánadagin 1. nov. 2004




**Í mars 2005 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist við óbroytt.**

**Hvítu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2005 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 660 í telefonbókini 2004,og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 93 01.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**
(A) Standardlýsing ................................ kr. 700,00
(B) Innramming.................................... kr. 800,00
(E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) . kr. 25,00
(sí dømi á s. 658 í Telefonbókini 2004)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 659 í telefonbókini 2004, og skal sendast til:
Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn, ella faks 32 11 66.
**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

tel 30 30 30 www.tele.fo www.nummar.fo · info@nummar.fo - www.gulu.fo · info@gulu.fo FØROYA TELE